# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hovsaloysnir uppundir val

Løgtingið hevur við 24 atkvøðum samtykt, at undirsjóvartunnil skal gerast til Sandoynna. Lat okkum sláa fast, at neyvan nakar her á landi hevur nakað ímóti, at sandoyingar fáa fast samband við meginøkið. Men vit loyva okkum at ivast stórliga í, um hetta er rætta løtan at fara undir eina so stóra íløgu.

Løgtingið átti at bíðað við hesi avgerð og tikið hana við í viðgerðina av infrakervinum sum heild í komandi valskeiði. Tað er skeivt í berum panikki at koyra hetta málið ígjøgnum beint upp undir val. Hetta er einki minni enn tað reina valagn.

Hvar eru okkara politikarar, tá tað snýr seg um at játta smáupphæddir til eldraverkið, til heilsuverkið og til skúlan. Ìtøkilig dømi eru um hetta seinastu dagarnar, har eitt nú ábøtur á sambýlum kring landið verða kveistraðar til viks, har tey gomlu á eitt nú vælvirkandi eldrastovni sum Tjarnargarði missa sín fysioterapeut, sum heldur lív í kropslimunum osfr. Hetta er einki minni enn ein niðurgerð av virðum og menniskjum. Vit hava eisini brúk fyri at gera íløgur í ungdóm og útbúgving heldur enn at játta milliardaupphædd til enn ein tunnil. Tí tað er higani, at samfelagið skal fáa eitt meira fjølháttað og mennandi framtíðar vinnulív, sum aftur skal vera grundarlagið undir menning og trivnaði.

Tað er gingin prestisja og valagn í tunnilsmál. Vit eiga at steðga á, ja koyra tummilin niðureftir fyri tunnlunum og raðfesta íløgur øðrvísi, í hvussu er í løtuni. Hví skal alt skundast ígjøgnum beint upp undir eitt val. Er hetta ikki forkastiligt, tá hugsað verður um, hvussu somu politikarar niðurprioritera eitt nú tey eldu og sjúku og ikki minst okkara ungdóm, sum tørvar betri útbúgvingarkarmar.

Øll unna vit sandoyingum betri samband, men vit mugu eisini steðga á og spyrja, hví slíkan skund og hví skal hetta vera uppá bekostning av teimum eldru, sjúku og komandi ættarliðum av vælútbúnum føroyingum, sum skulu føra samfelagið víðari.

Tað er rætt sum andstøðan førir fram, at tað er fullkomiliga burturvið at skrambla stórmál ígjøgnum beint uppundir val. Lat okkum í felag og við atliti til yvirupphitaða virksemið fremja eina robusta semju um allar íløgurnar í undirstøðukervið komandi 10 árini. Taka hetta við í eina landsplanlegging. Sama við heilsuverki, skúla og øðrum. Er tað nakað, sum vit ikki hava brúk fyri í løtuni, so eru tað hovsaloysnir uppundir val. Lyklaorðini, lykilin, sum skal lata dyrnar upp til framtíðina, eru landsplanlegging og raðfesting.

**Sosialurin**

# Nýtt lógaruppskot í tráð við Visión 2015

Lógaruppskotið um skrásetingargjald av bilum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur lagt fyri Tingið, er bæði í tráð við Visión 2015 og málið hjá ES um at harmonisera bilavgjøldini í øllum ES-londunum.

Hetta er týðandi at staðfesta, eftir eina oddagrein í Sosialinum 27. november 2007.

Yvirskriftin á oddagreinini í Sosialinum var: "Fíggjarmálaráðið gongur ímóti Visión 2015". Hesa yvirskriftina grundar oddagreinsskrivarin á, at í nýggja lógaruppskotium um skrásetingargjald fer tað ikki at bera til at flyta inn bilar sum flytigóðs.

Oddagreinsskrivarin hevur helst ikki sett seg nóg væl inn í Visión 2015 og nýggja lógaruppskotið um skrásetingargjald, tí tað er fult í tráð við Visión 2015-ætlanina, at tað ikki longur fer at bera til at flyta bilar inn í landið sum flytigóðs.

Hetta fer nevnuliga at tippa eitt hol í galdandi lóg, ið summi kunnu gera sær dælt av. Í flestu londunum uttan um okkum og í ES er tað soleiðis, at ein persónur fær avgjøld afturgoldin, um persónurin flytir av landinum við bili sínum. Persónurin skal síðan gjalda skrásetingargjald í tí landinum hann flytir til og skrásetur bilin.

Soleiðis verða ásetingarnar eisini í nýggja føroyska lógaruppskotinum um skrásetingargjald. Tey, sum flyta av landinum fáa skrásetingargjald afturgoldið, meðan allir bilar, ið verða fluttir inn í landið, verða viðgjørdir eins. Tað merkir, at teir skulu rinda skrásetingargjald, tá bilarnir verða skráettir í Føroyum.

Í dag gera summi sær dælt av, at tað ber til at flyta bilar inn í landið sum flytigóðs. Hesir persónar flyta dýrar bilar inn í landið avgjaldsfrítt sum flytigóðs og kunnu vinna fleiri hundrað túsund krónur við at selja bilarnar aftur í Føroyum til føroyskan marknaðarprís.

Hetta er avgjørt ikki í tráð við Visón 2015, har eitt av málinum er, at skatta- og avgjaldslógin verður líka fyri øll og ikki gevur serrættindi til ávísar persónar ella samfelagsbólkar.

Nýggja lógaruppskotið um skrásetingargjald er tí bæði í tráð við Visión 2015 og og málið hjá ES um at harmonisera bilavgjøldini í øllum ES-londunum.

***Argir 28. november 2007***
***Fíggjarmálaráðið***

# Tillukku Gerhard og Páll - Eitt týdningarmikið stig fyri Føroyar

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður



Ikki bara fyri Gerhard Lognberg og Páll á Reynatúgvu var hósdagurin 29. november ein góður dagur, men hetta er einki minni enn eitt týdningarmikið stig fyri Føroyar, nú Sandoyartunnilin varð samtyktur.

Tá talan er um menning, alheimsgerð og búsetingarmøguleikar, er samferðsla og samskifti grundleggjandi tátturin, og einki er meiri sjálvsagt enn fyri eitt oyggjaland sum Føroyar, at fáa bundið oyggjarnar saman við tunnlum og brúm.

Tað kundi tí undra, men tað átti tað kanska ikki at gjørt, tá okkara almenni - public service – fjølmiðlastovnurin Kringvarp Føroya, í tíðindaløtuni 29. november á middegi setti Gerhardi Lognberg spurningin: " Hvat sigur tú til, at allir føroyingar skulu gjalda fyri hetta?"

Hetta var tá ein genialur spurningur, sum um hetta var ein gáva frá øllum føroyingum til Páll og Gerhard og kanska onkran hissini sandoying.

Hetta kann ræða, tí ein spurningur er, um hetta tíðindafólkið setur spurningin, sum høvuðsstaðarpressan hugsar?

Nei, tillukku Gerhard og Páll, tit báðir hava - í ein serstakan mun - saman við okkum tingfólkum, tikið eitt risastig inn í framtíðina fyri alt tað føroyska samfelagið, og hetta hevur ikki verið gjørt uttan svørðslag.

Um tað so skal vera tað seinasta eg geri í landspolitikki, so fegnist eg, og eingin ivi er um, at meginparturin av Føroyafólki ídag fegnast!

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.